## DAGSINS MEINING

# Hvat nú?

Nú er eingin trupulleiki at dyrka hjá Tjóðveldisflokkinum á Fólkatingi. Málið um viðurkenning sum tjóð, ið teir høvdu blást upp til at vera ein trupulleika, vísti seg ikki at vera nakar trupulleiki. Hetta vistu tey flestu.

Hvat er so til ráða at taka. Jú, formaður Tjóðveldisfloksins proklamerar ein stórsigur til samgonguna út frá einari sjálvfylgju, ið eingin uttan teir hava ivast í.

Hvat kemur so nú. Sólin rísur uppá sama máta hvønn morgun og einki er broytt. Hvat skulu Tjóðveldismenn brúka sín "stórsigur" til? Fara danir nú knappliga at góðtaka loysing fyri danskar pengar í 15 ár? Fara samráðingar við danir nú knappliga at ganga eftir einum høvdi? Nei ikki man tað fara at verða. Vónandi eru menn so at sær komnir, at teir fara at lata vera við at renna til ST.

Tað verður pínligt fyri føroyingar, um vit sum eitt av heimsins ríkastu londum fara til ST at grenja um hvussu fáar milliardir vit fáa við okkum, tá vit loysa. Onnur lond hava ligið í áralangum sakarmálum í Haag móti fyrrverandi koloniharrum, tí øll teirra landbúnaðarjørð var brúkt til sulfidminur, meðan uppaftur onnur eru í krígsstøðu og hungra. Realitetssansur er ikki júst tað, ið hevur eyðkent fullveldisætlanina higartil, og má man nú vóna at menn ikki fara heilt á flog nú valdesperatión fer at gera seg galdandi.

Nú burdi Tjóðveldisflokkurin steðgað við orðklúgvarínum, tí tað er so dyggiliga progvað, at tað er politiskur vilji, ið skal til og einki annað. Ein semja um eina skipan, ið liggur millum Hiemastýrislógina og fullveldi burdi verið løtt at fingið. Hetta ynskja allir flokkar uttan Tjóðveldið, ið vil hava alt ella einki. Tjóðveldið hevur jú viðurkent, at tað verður einki fullveldi tey næstu nógvu árini, og tí átti ikki at verið nøkur grund til at mótarbeitt einari millumloysn, ið fekk teir et vet nærri teirra máli.

Tað verður sjálvandi eitt sindur pínligt fyri Tjóðveldismenn og aðrar, tá tað nú fer at vísa seg, at tað ber væl til at víðka um sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin, tí hetta var júst tað, ið sambært teirra stívu uppfatan og sambært parti í Hvítubók ikki bar til.

Vónandi verður 2002 árið, tá realpolitikkur aftur kemur á skránna eftir at onnur ting hava dominerað í útvið 4 ár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útvarp Føroya dýrt skuffilsi

**Ingibjørg Egholm**
*Streymnes 07.01.02*

Eri í løtuni í barnsburðarfarloyvi. Saman við øllum øðrum, sum er at gleða seg til framman undan farloyvinum, gleddi eg meg eisini til at fara at hava tíð til at lurta eftir útvarpinum. Tá eg eri til arbeiðis plagi eg at lurta eftir útvarpinum, men tá hoyri eg tað bert í brotum og í bakgrundini. So nú gleddi eg meg til verðuliga at hava tíð at lurta. Eg var tó ávara frammanundan um, at lítið var í væntu av onkrum sum eg kenni, sum júst hevur verið í barnsburðarfarloyvi. Tíverri mátti eg ásanna, at ávaringin var eftirfarandi. Útvarpið hevur verið eitt stórt skuffilsi.

Sitið við útvarpskránni fyri hesa vikuna og má ásanna, at hon líkist tí frá síðstu viku, tónleikasendingar, endursending av tónleikasendingum út í æsir. Einki ilt at siga um tónleikasendingar og tey, sum dáma tær, men vit eru onnur, sum halda, at aðrar sendingar høvdu verið áhugaverdari og tá ið tónleikur fyllir meira enn helvtina av senditíðini, er útvarpið lítið vert hjá okkum.

Ikki alt er óviðkomandi fyri meg. Mær dámar t.d. væl sendingarnar "Tilvera" hjá Armgarð Arge, "Stýrivolt" hjá Birgiri Kruse og ymiskar ljóðmyndir hjá Árna Joensen. Annars sýnist tað sum um sendingar til mín málbólk verða gloymdar av útvarpinum.

Eg havi búð í Danmark í nógv ár og hevði stóra gleði av Danmarks Radio og teirra sendingum. Tað eru so nógv viðurskifti í samfelagnum, sum eru áhugaverd og sum góðar og uppbyggjandi sendingar kunnu gerast um. Tilfar kann eisini fáast frá tíðindasendingunum til evnissendingar har aktuell evni verða lýst út í æsir.

Eitt evni kundi t.d. verið viðurskiftini hjá brekaðum, sum fyri jól vóru umrødd í tíðindunum í samband við verkfallið hjá pedagogunum. Nógvar góðar sendingar kundu verið gjørdar um hesi fólk, sum í gerandisdegnum eru ein ósjónligur ella gloymdur bólkur, um lív teirra, gerandisdagin, arbeiði o.a. Hesar sendingar høvdu fyri meg og nógv onnur verið meira áhugaverdar enn endursendingar av "Løgum mær dámar" ella aðrari tónleikasending.

Eitt annað evni, sum var umtalað í tíðindunum seinasta heyst var, økta játtanin á fíggjarlógini til Heilsufrøðiligu Starvstovuna. Hví ikki gera eina sending um Heilsufrøðiligu Starvstovuna, um hennara arbeiðsøki, hvat gera starvsfólkini og hví ella um neyðugt er við meira peningi. Hetta eru bara tilvildarlig dømi. Allastaðni í Føroyum eru fólk, sum hava okkurt áhugavert at gera ella siga frá, so tær nýtist ikki at leita eftir áhugaverdum tilfari. Tað liggur alt beint framman fyri nøsini á okkum øllum.

Eftir ein morgun við endursendingum gleði eg meg til tíðindini kl. 12:20. Men aftur skuffað. Fyri tað nógva fylla uttanlandatíðindini alla tíðindasendingina og mangan tykist tað, sum at hesi tíðindi helst skulu koma frá so fjarskotnum londum sum gjørligt. Fyri mær sýnist tað, sum um útvarpsfólkini hava trupuleikar at skilja ímillum viðkomandi og óviðkomandi tíðindi. Víst er tað syndarligt, at ein bussvanlukka í Cambodia hevur kostað 20 fólkum lívið. Men hvønn týdning hevur tað fyri føroyska lurtaran at fáa at vita, hvussu bussførarin eitur og á hvørjum vegastrekki vanlukkan hendi?

Øll sum hava eitt útvarpstól skulu gjalda útvarpsgjald tað sigur lógin. Men eg má siga, at tað er við ringum tannabiti eg gjaldi hesa rokning.



# Yvirskot ella undirskot ?

**Helgi Abrahamsen**

Aftur í ár upplivdu vit í fjølmiðlunum at síggja landsstýrismannin í fíggjarmálum greiða frá einum yvirskoti á fíggjarlógini fyri komandi árið, og aftur í ár vísir hann á úrslitið, sum tað sær út áðrenn avdrøgini av lánum eru goldin.

Um avdrøgini verða tikin við í roknistykkið, verður úrslitið á fíggjarlógini fyri 2002 ikki eitt yvirskot, men undirskot.

Allir føroyingar eiga at gera sær greitt, at avdrøg skulu gjaldast á hvørjum ári, og at so verður eisini í 2002.

Hetta merkir heilt einfalt, at hóast landsstýrismaðurin vísir á eitt avlop á umleið 100 mió. krónur, so minka krónurnar í kassanum, tí 141 mió. krónur skulu gjaldast í avdráttum.

**Hálvur sannleiki**

Tað er sum so einki gali í tí, at tosa um avlop áðrenn avdrøg. - Men so má fólkið fáa at vita, at tað er tað, ið tosað verður um.

Landsins politikarar kunnu ikki loyva sær at tosa um eitt avlop áðrenn avdrøg, í teirri vón, at fólkið skal skilja tað sum um at talan var um eitt avlop, tá alt er goldið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Týr:

# Ætla at yvirhála Emmu

**Hósdagin 10. januar kemur fyrsta fløgan hjá bólkinum Týr á marknaðin. Fløgan, ið kallast »How Far to Asgaard« kemur út í samskipan við konsertirnar Tutl hevur, ið sambandi við 25 ára føðingardagin hjá plátufelagnum. Tað er eisini Tutl, sum gevur fløguna út**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*



*Fremstur: Kári Streymoy. Aftanfyri frá vinstru: Pól Arni Holm, Terji Skibenæs og Heri Joensen. Gunnar Hansen vantar á myndini.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Progressivur etniskur metal rockur. Soleiðis kalla teir í Týr tónleikaslagið teir standa fyri. Fløgan »How Far to Asgaard« inniheldur átta løg og tilsamans er ein lítil tími av tónleiki. Ormurin Langi, sum vann sær fótafesti innan almenna føroyska hittlistan í vetur, er við sum einasta føroyska lagið. Annars er alt hitt á enskum. Týr hevði lítlan tíðindafund í Norðurlandahúsinum í gjár. Tilstaðar vóru allir limirnir í bólkinum uttan bassleikarin. Hann skuldi koma til Føroya í gjárkvøldið og við í kuffertinum skuldu nýggju fløgurnar vera. Í gjár søgdu Týr:

– Vit fóru í studio tann 24. september í fjør. Fyri umleið einum mánaða síðani var liðugt at taka upp, mixa og mastera. Fløgan er innspæld á Toccata Studio á Nørrebro í Keypmannahavn.

Sum heild var hetta ein bílig verkætlan. Góðar 15.000 krónur vórðu lagdar í fløguútgávuna, og er hetta fíggjað við peningi bólkurin hevur fingið fyri at spæla. Til dømis á Jelling, Prix Føroyar og á øðrum konsertum. Grundin til, at hetta varð so bíligt er, at studioið er stuðlað av Københavns Kommune, og býrt tú í kommununi fært tú tað bíligari enn vanligt.

– Úrslitið eru vit hampuliga væl nøgdir við. Studio var ikki tað dýrasta ella flottasta vit hava sæð, men úrslitið er bara gott.

**Nýggjan guitarleikara**

Eina viku aftaná Týr var farið í studio at taka upp til fløguna, gavst Jón Joensen, sum guitarleikari. Hetta hevði við sær, at Heri yvirtók alt guitarspælið og er tað hann, sum stendur fyri øllum guitarspælinum á fløguni.

Progressivi etniski metal rockbólkurin hevur nú tó fingið ein nýggjan guitarleikara. Tað er Terji Skibenæs, sum er kendur fyri at hava spælt í bólkinum Flux, sum er settur í staðið hjá Jón.

Týr hevur longu havt sína fyrstu konsert við nýggja guitarleikaranum. Tað var tann 28. desember á Tvøroyri, og gekk tað bara væl, sigur manningin í Týr. Spurdur um, hvussu honum dámar í nýggja bólkinum sigur Terji:

– Mær dámar væl. Hetta er øðrvísi enn Flux, og hetta er eisini meira tann stílurin, sum mær dámar at spæla. Harafturat so liggur ein størri avbjóðing í hesum spælinum enn í tí eg gjørdi í Flux.

**Eyga fyri útlondum**

Nú fløgan kemur út fer Týr at leggja seg eftir at fáa møguleikar at spæla so nógv sum gjørligt í útlondum. Fremst á skránni nú er presentatiónskonsertirnar teir fara at hava saman við øðrum bólkum í sambandi við føðingardagin hjá Tutl.

Tann 1. februar stendur slagið í Pumpehuset í Keypmannahavn. Hetta er finalan í eini kapping, sum Týr hevur ognað sær sess í fyri lítlum ári síðani. Tá vera fjølmiðlarnir tilstaðar og eisini umboð fyri ymisk plátufeløg. Sagt verður, at tað er lættari at sleppa ígjøgnum nálareygað, tá tú hevur eina fløgu at vísa aftur á.

– Vit fara at royna at sleppa at spæla so nógv sum gjørligt í so nógvum londum sum møguligt, siga kvæðarockararnir.

– Kanska vit fara aftur til Jelling, og umboðið fyri Nibe festivalin, har Clickhaze var hevur biðið um eina demo frá okkum. So vit fara at royna at sleppa við til onkrar av teimum stóru festivalunum í Danmark.

Hósdagin 10. januar tá fløgan kemur út verður fyrsta konsertin, har møguleiki eisini verður at keypa fløguna. Hon verður í Støkk høllini, tað sum fyrr var Glyvra Bio, á Glyvrum. Eisini aðrir bólkar vera við. Konsertin byrjar klokkan 20.00. Tvær aðrar konsertir vera eisini. Onnur er á Tvøroyri fríggjakvøldið og hin er í Norðurlandahúsinum í Havn leygarkvøldið.

Fløgan er í fyrsta umfarið prentað í 1000 eintøkum, men hon tekur minni enn eina viku at endurprenta um tørvur skuldi verið á tí.

– Ja, vit ætla at taka Emmu aftur, siga tónleikararnir flennandi.

Við í Týr eru: Pól Arni Holm, sang, Heri Joensen, guitar, Kári Streymoy, trummur, Gunnar Thomsen, bass og Terji Skibenæs, guitar.

# Nýggjur Sparikassabygningur úti í Hornabø

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Við síðuna av Føroya Banka úti í Hornabø byrjar ein bygningur at taka skap. Hetta er nýggi bygningurin hjá Føroya Sparikassa. Føroya Sparikassi hevur leingi havt deild í Hornabø, men hetta er ein modernisering av tí gomlu deildini.

– Hin deildin var so niðurslitin, sigur Jákup Jacobsen, byggiverkfrøðingur.

– Slíkar deildir halda bert í eini 10 ár, og hendan man vera eini 15 ára gomul. Krøvini til deildir sum hesa broytast eisini, so hetta er stutt sagt ein modernisering av gomlu deildini.

Deildin verður ein avgreiðsludeild hjá sparikassanum har umleið seks fólk koma at starvast dagliga. Hon kemur at vera eitt sindur øðrvísi enn hon er nú, men dagsverkini koma tó at vera tey somu.

Arbeitt verður við eini útgreining av sjálvari deildini, og tí var ikki so nógv at fáa at vita, tá vit tosaðu við Jákup Jacobsen í gjár. Væntað verður at deildin letur upp fyrst í februar mánaða.



*Deildin hjá Føroya Sparikassa úti í Hornabø er við at taka skap. Ætlanin er, at hon letur upp fyrst í februar mánaða*
*Mynd: Jens Kr. Vang*